Landsfundur Sambandsfloksins 1994

Arbeiðsloysisskipanin er neyðug, men neyðugari er at skapa arbeiði

Varð lurtað eftir Sambandsflokkinum fyri 20 árum síðan, høvdu vit í dag eina arbeiðsloysisskipan, sum virkaði. Ella kanska høvdu vit einki arbeiðsloysi havt! Verandi arbeiðsloysisskipan er ein mylnusteinur um hálsin á vinnulívinum og arbeiðsfólkinum. Men nú arbeiðsloysið er vorðið ein so beiskur veruleiki, er alneyðugt at hava eina skipan, sum tryggjar tey, ið ongar atvinnumøguleikar hava, so at tey ikki verða slept upp á fjall

PÓL Á KLETTI

Sambandsflokkurin hevur seinasta árið havt ein arbeiðsbólk sitandi at viðgera tað umfatandi arbeiðsloysið, sum er í landi okkara. Formaður í hesum bólki hevur verið Terje Davidsen, løgtingsmaður.

Núverandi arbeiðsloysisskipan kom í gildi í 1992. Áðrenn tað vóru ymsi uppskot um at seta í verk skipanir áðrenn arbeiðsloysið gjørdist veruleiki. Sambandsflokkurin hevði uppskot um hetta í 1975. Og seinni hava onnur uppskot verið frammi.

Tó varð einki ítøkiligt sett í verk fyrr enn arbeiðsloysið var ein beiskur veruleiki. Hetta var heldur seint, tí grundarlagið hjá skipanini at gjalda út varð so veikt.

Orsøkir til arbeiðsloysið

Á landsfundi Sambandsfloksins næstseinasta vikuskifti legði Terje Davidsen fram tilmæli arbeiðsbólksins.

Víst varð á, at ymsi viðurskifti hava ávirkað gongdina so at vit í dag eru endað í stórari fíggjarkreppu og einum stórum arbeiðloysi. 1. januar 1977 varð sjómarkið flutt út á 200 fjørðingar. Okkara fjarfiskifloti fekk trengri ræsur. Landgrunnurin gav ikki so nógv, at hann megnaði at útvega landinum neyðugar inntøkur. Yvirtøkur kostaðu eisini fíggjarliga. Fíggjarliga grundarlagið undir samfelagnum vóru læntir pengar í stóran mun.

Henda skeiva gongdin kundi ikki halda fram. Sambandsflokkurin var tann, sum ávaraði eina harðast móti gongdini. »Synd at siga, at vit gjørdust populerir fyri tað,« segði Terje Davidsen.

Ein mylnusteinur

Tað vóru fá alternativ til fiskivinnuna. Sambandsflokkurin var í landsstýrinum tá farmaskipaflotin varð bygdur út – sum eitt alternativ.

»Tíverri hevði samgongan 1985-88 – Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin – ikki sama positiva áhuga fyri hesum møguleika, so tá skipini komu í tiðaravmarkaðar trupulleikar var ikki nógvur vilji at varðveita henda møguleika,« segði Terje Davidsen.

Sum alternativ til uppskot landsstýrisins til arbeiðsloysisskipan í 1992 skjeyt Sambandsflokkurin upp at fíggja skipanina yvir fíggjarlógina. Hetta skuldi gerast við sparingum og privatiseringum. Men uppskot landsstýrisins varð samtykt.

»Eftir hesum samtykta uppskotið, ið varð sett í gildi sum lóg, varð stórt gjald lagt á vinnulívið. Hetta hevur havt við sær, at virki noyðast at snara lykilin um – og harvið økist arbeiðsloysið. Henda skipan er ein mylnusteinur um vinnulívið og arbeiðsfólkið,« segði Terje Davidsen.

Hann segði, at skipanin er ein royndt at sleppa landsstýrinum undan trupulleikum av teimum arbeiðsleysu. Sambandsflokkurin metir hetta vera eina skiva skipan. Longu 3/4 ár eftir, at útgjaldið byrjaði, var skipanin í trupulleikum og tørvaði pening.

Haldbarari skipan

Síðan er tað hent, at arbeiðsloysisskipanin er vorðin partur av avtalunum millum ríkisstjórnina og landsstýrið. Hetta ger, at skal ein broyting gerast í skipanini nú, er neyðugt at fremja tær í samráð við dansku stjórnina.

Aftur nú í mars-apríl er skipanin í fíggjartrupulleikum. »Hetta, at grundin undir skipanini er so svikalig, hevur við sær, at tey arbeiðsleysu ikki hava eina trygga skipan. Tey eru ótrygg. Neyðugt er við eini meira haldbarari skipan,« segði Terje Davidsen.

Sambandsflokkurin hevur nú lagt uppskot fyri tingið um at gera broytingar í skipanini so inngjaldið verður tryggari við tað at landskassin átekur sær t. d. 60% av inngjaldinum.

»Skal henda broyting gerast, er neyðugt við nýggjum samráðingum við dansku stjórnina. Hugsandi er, at danska stjórnin fer at góðtaka eina skipan, sum átøk er teirri dansku, har tað almenna letur eini 70% av inngjaldinum til skipanina meðan partarnir á arbeiðsmarknaðinum lata eini 30%, segði Terje Davidsen.«

Við hesum helt hann, at vit fáa tann frið og ta trygd, sum neyðug er.

Leiðin fram

Eitt er at hava eina arbeiðsloysisskipan, sum virkar, annað og meira umráðandi er at virka fyri umstøðum, sum minka um arbeiðsloysið. Og hvussu gerst tað? Hvør er leiðin fram?

»Neyðugt er at troyta allar møguleikar. Nógv hevur verið talað um møguleikar við ES-limaskapi og møguleikum við triðjalandsfiski. Her eru nakrir møguleikar, sum neyðugt er at kanna gjøllari. Neyðugt er, at umsitingin av samfelagnum verður bíligari við rationaliseringum og privatiseringum. Nevndur er møguleikin hjá føroyskum fiskiskipum at royna á fremmandum leiðum, t. d. í Sierra Leone. Neyðugt er, at søluprisirnr hækka og at vit fáa betri pris fyri okkara framleiðslu,« segði Terje Davidsen.

Annað, ið neyðugt er at gera meira við, er:

- Økja virksemið innan ferðavinnuna
- Í størri mun troyta lítið kendar ella ikki í fult mát royndar leiðir
- Betri røkt av okkara heimligu fiskastovnum
- Øðrvísi fiskiveiði/sølumynstur. Sølu av feskum fiski. Framleiðsla til annað úr triðjalandsfiski (nýggj avtala við ES)
- Meira burtur úr fiskiskapinum við Flemish Cap (betri eftirlit við økinum so at ovveiða ikki fer fram)
- Fylgja møguleikunum innan oljuvinnuna sera gjølla
- Verja ríkisfelagsskapin
- Troyta møguleikarnar við studulsskipanum úr Danmark



Mynd: Andrea f. Jacobsen

Terje Davidsen: – Ein arbeiðsloysisskipan er eitt trygdarnet fyri tey, sum einki arbeiði hava, men gongda leiðin fram má altið vera at finna utvegir fyri meira arbeiði

Miele
Ein Miele fer væl við hondunum
Hon er eisini orkusparandi. Tað loysir seg betri at vaska við Miele enn at vaska við hond.
Koksmiðstoðin
á Hálsi - Tlf. 14949

Eingi seismisk loyvi fyrr enn eftir páskir

PÓL Á KLETTI

Enn hevur einki av teimum feløgunum, ið søkt hava landsstýrið um loyvi at gera forkanningar í føroyskum sjóøki, fingið loyvi. Og einki verður greitt fyrr enn eftir páskir.

Martin V. Heinesen á Føroya Jarðfrøðisavni, ið umsitur málið, sigur, at ein hevði vónað at kunna givið tí ella teimum feløgum, ein vildi hava, svar fyri páskir, men at málið er drúgvari at avgreiða enn so.

– Frá byrjan hava fleiri feløg verið inni í myndini, og júst hvar vit eru í processini er ilt at siga beint nú, tí tann kontaktin, ella vantandi kontaktin, vit hava havt við summi feløg, er nakað, ein eigur at fara stillisliga um hurðarnar við inntil endaligt svar verður givið, sigur hann.

Miðað verður ímóti at byrja forkanningarnar í summar. Bara tvey loyvi verða givin, og Martin V. Heinesen sigur, at tað meira enn so kann henda, at eitt einstakt felag fær bæði

Vit hava FJALL RAVEN ryggsekkir
Annars stórt úrval av ryggsekkum t.d. Lotus
pí Maria Poulsen & Co
Tórsgøta 10 - Tlf. 12001

FAVØR TRYSTIR PRÍSIRNAR Í BOTN

Sprongdur svínakambur fyri 1/2 kg 19.95

Merrild kaffi 500 gr. 24.95 15.95

Gularøtur Danmark 1. flokks 1 kg. 12.95

ÚR BLAÐNUM HESA VIKUNA

Luxus rosinur Eldorado 500 gr. 2 fyri 15.00

Pipar Holland 1. flokks 2 fyri 10.00

Entre Cotes 700 gr. 4 fyri 65.00

nýtt nýtt Íslagkaka nougat ella jorðber frítt val 1 ltr. 21.95

Súreplir Granny Smith 1. flokks 10 fyri 15.00

Knorr sósir ym. slog 4 brov í pk. 1 fyri 17.95

MIKLAGARÐUR
KOLONIAL TLF. 13011 • SLAKTARIN TLF. 15262
favør